# Uttanríkis- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 29. apríl 2021 |
| Mál nr.: | 16/01419 |
| Málsviðgjørt: | HZH/JN |
| Ummælistíð: | 3. / 17. mai 2021 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um studning til skúlagjald fyri næming, sum tekur lestrarfyrireikandi altjóða gymnasiala miðnámsútbúgving uttanlands

Við heimild í § 6b í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 44 frá 22. apríl 2021, verður ásett:

**§ 1.** Studni kann veita studning til skúlagjald íroknað mat og innivist fyri næming, sum tekur gymnasiala miðnámsútbúgving á United World College Red Cross Nordic í Noregi, eftir at hava lokið fyrsta árið av gymnasialum miðnámi í Føroyum.
*Stk. 2.* Studningur til skúlagjald íroknað mat og innivist fyri tann einstaka næmingin kann í mesta lagi verða veittur í 2 ár.
*Stk. 3* Studningur verður í mesta lagi veittur soleiðis, at ein næmingur verður tikin inn um árið, og hann gongur í tvey ár í skúlanum.

**§2.** Føroyska nevndin fyri United World College, UWC Føroyar, sum virkar eftir reglum, sum landsstýrismaðurin góðkennir, velur ímillum umsøkjarar á hvørjum ári ein næming, sum verður mettur at vera skikkaður at verða tikin upp á UWC skúlanum.
*Stk. 2.* Nevndin sambært stk. 1 hevur 5 limir umboðandi:

1) Norrøna Felagið í Føroyum
2) Reyða Kross Føroyar
3) gymnasialu miðnámsskúlarnar
4) Uttanríkis- og mentamálaráðið
5) fyrrverandi næmingar á skúlanum.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin tilnevnir limirnar fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið og gymnasialu miðnámsskúlarnar.

**§ 3.** Umsókn um studning skal sendast Studna á serligum umsóknarblaði.
*Stk. 2.* Er umsøkjarin undir 18 ár, verður umsóknin váttað av foreldramyndugleikanum.

**§ 4.** Næmingurin skal av sínum eintingum hálva hvørt ár senda Studna skjalprógv frá skúlanum um lestrargongd og lestravirkni.
*Stk. 2.* Um næmingur gevst, skal hann boða Studna frá beinanvegin.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, dagfesting

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Skjal 1**

## Heitið á skjalinu